Borgarlig privatiseringssamgonga:

# Vágafólk kunnu eiga avgerðina

**Kristoffur Gaardlykke, Miðvágur,**
*valevni Javnaðarfloksins í Vágum*



Tað kunnu koma nógv úrslit burtur úr eini veljarakanning, og henda síðsta var einki undantak. At verandi samgonga misti meirilutan var mest sjónska úrslitið. Men smáar broytingar kunnu geva nógv onnur áhugaverd úrslit, og serliga er vert at leggja til merkis, at tað lættliga kann henda, at Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin, møguliga við hjálp frá smærru flokkunum, kunnu fáa møguleikan at skipa eina borgarliga samgongu.

Eina borgarliga samgongu, sum kemur at lata standa til við viðurskiftinum millum Føroyar og Danmark, men kemur at leggja alla orku í at reka borgarligan politik.

Ein borgarligan politik, hvørs høvuðsmál verður at privitisera. Hesaferð verða tað ikki bussar og farmabilar sum fara at skifta lit, men søla av Føroya Banka, Fiskasøluni, Fiskavirking, Atlantic Airways, JFK Trol og øðrum almennum ognum.

Hetta skal gerast í skundi, so tíð verður ikki at bíða eftir besta prísinum ella rætta keyparanum, og óivað verða gamlir kenningar og útlendingar fyrst at trognum.

Men hesi ætlan kunnu vágafólk steðga. Tað gera tey við at seta eitt javnaðarfólk á ting tann 30. apríl.

Ein sterkur javnaðarflokkur á tingi vil tryggja, at viðurskiftini millum Føroyar og Danmark fáa eina virðiliga loysn, eins og tey ið starvast í almennum fyritøkum, framhaldandi fáa tryggar karmar at virka undir, okkum øllum at gagni.

# Ríkisrættarliga støðan

**Mikkjal Sørensen, valevni**
*Javnaðarfloksins í Suðuroy*



Polariseringin í fólkinum er sjónlig, eftir fýra ár við sitandi samgongu, har fullveldiskósin varð stungin út í kortið, men ítøkiligu úrslitini eru ikki mong. Sjónligastu varðarnir eftir fullveldispolitikkin, er ein bólgnað umsiting, og ætlanir, ið ein komandi samgonga skal rinda rokningina fyri.

Veljarakanningar vísa, at veljarin metir, at tíðin er komin, at onnur leiðsla kemur á brúnna.

Sjálvstýrislógin, uppskot Javnaðarfloksins, er gongd leið. Savnandi loysnir skulu finnast, og miðað verður eftir breiðari semju. Sjálvstýrislógin greiður viðurskiftini millum Føroyar og Danmark á virðiligan og skynsaman hátt. Okkara sjálvstýri verður økt, so hvørt fíggjarligar og fyrisitingarligar fortreytir eru til staðar.

Føroya Løgting, sum umboð fyri Føroya fólk, verður hægsti myndugleiki í Føroyum, og Føroyar verða staðfestar sum tjóð við fullum sjálvsavgerðarrætti.

Sjálvstýrislógin skal í sáttmála staðfesta Føroyar og Danmark sum tvey sjálvstøðug og javnsett lond í ríkisfelagsskapi hvørt við annað. Formligar avmarkingar fyri, hvørji mál og málsøki kunnu yvirtakast, skulu burtur. Øll mál koma undir føroyskt sjálvræði, tá Føroya Løgting ger tað av

# Sambandsflokkurin „æruna“ av fullveldistilgongdini

**Vilhelm Johannesen,**
*valevni javnaðarfloksins í Norðoya valdømi*



Tað eru nú fleiri ár síðani, at javnaðarflokkurin var greiður yvir, at heimastýrislógin ikki longur var hóskandi karmur um samstarvið í ríkisfelagsskapinum við Danmark. Flokkurin fór tá at tosa um eina sjálvstýrislóg, ið skuldi javnseta Danmark og Føroyar, sum tvey sjálvstøðug lond í ríkisfelagsskapi hvørt við annað.

Út frá hesi støðutakan legði flokkurin fram uppskot til samtyktar tann 30. september 1996. Í uppskotinum til samtyktar varð sagt: „Løgtingið samtykkir at seta nevnd sambært § 25 í Tingskipan Løgtingsins at fyrireika setan av stjórnmálanevnd at viðgera stýrisskipanarligu og ríkisrættarligu viðurskifti Føroya. Í nevndina verður valt eitt umboð fyri hvønn flokk á tingi.“

Sambært uppskotinum skuldi løgtingsnevndin hava henda arbeiðssetning: gera uppskot til á hvønn hátt stjórnmálanevndin skal setast, gera uppskot til arbeiðssetning hjá stjórnmálanevndini, gera uppskot til hvussu stjórnmálanevndin skal mannast, gera uppskot til, hvussu long tíð skal nýtast til arbeiðið, gera kostnaðarmeting av arbeiðnum, koma við tilmæli um onnur viðurskifti av týdningi í sambandi við arbeiðið. At enda varð sagt í uppskotinum, at nevndin skuldi leggja lidna arbeiðið sítt fyri løgtingið til støðutakan fyri jól 1996.

Sum so ofta fyrr setti sambandsflokkurin tað tvøra beinið fyri í hesum málinum eisini. Í álitinum frá rættarnevndini søgdu umboðini fyri sambandsflokkin: „Ein minniluti (Bjørn á Heygum og Maria Hansen) metir, at eingin enn hevur verið førur fyri at víst á nakran sakligan og juridiskan tørv á ítøkiligum broytingum í ríkisrættarligu støðu Føroya.“ Og minnilutin heldur fram: ”Eisini metir minnilutin, at heimastýrislógin hevur rættuliga víðar karmar og gevur stórar heimildir.” Og at enda varð sagt: ”Í hesum sambandi kann somuleiðis staðfestast, at enn eru langt frá allir møguleikar í heimastýrislógini troyttir.”

Uppskot um at seta eina stórnmálanevnd, varð aftur framlagt í tingsetuni 1997, men eisini tá var sambandsflokkurin ímóti. Umframt at vera ímóti uppskotinum, hótti sambandsflokkurin hinar samgonguflokkarnar við brandi og báli, um teir loyvdu sær at taka undir við málinum. Úrslitið varð at málið varð felt eina ferð enn. Í tingsetuni 1998 varð málið um stjórnmálanevnd sett fram á triðja sinni. Hesa ferðina datt málið burtur av tí at sambandsløgmaðurin í ótíð útskrivaði nýval at verða 30. apríl 1998. Seinni hevur sambandsflokkurin so fingið ein dyggan hvøkk. Tað hendi eftir løgtingsvalið í 1998 tá borgarliga fullveldissamgongan varð skipað og skjøtul varð settur á fullveldistilgongdina.

Nú hevur sambandsflokkurin umsíðir ásannað, at heimastýrislógin ikki longur er hóskandi karmur um samstarvið í ríkisfelagsskapinum, og flokkurin tosar nú um eitt nýskipanaruppskot. Men hevði sambandsflokkurin lurtað eftir javnaðarflokkinum, og gingið við til at seta eina nevnd, at fyrireika setan av eini stjórnmálanevnd, longu í 1996, tá javnaðarflokkurin legði uppskot um hetta fram á ting, høvdu fullveldisflokkarnir ongantíð fingið ta undirtøku, sum teir tíverri fingu á valinum í 1998. Hetta er tíverri veruleikin, og tí kunnu vit geva sambandsflokkinum „æruna“ av teirri fullveldistilgongd, sum verið hevur hesi seinastu fýra árini.

Skulu vit hava eina virðiliga loysn á ríkisrættarligu støðuni er tað avgjørt neyðugt at javnaðarflokkurin gongur á odda í hesum arbeiði. Vit eiga at finna skilagóðar loysnir, ið fáa breiða undirtøku í løgtinginum, og sum ein rímuliga stórur meiriluti av føroysku veljarunum kann taka undir við. Hesa loysnina hevur javnaðarflokkurin. Men tit hava atkvøðurnar. Fær javnaðarflokkurin tykkara atkvøður á valinum, fáa tit ta skilabestu loysnina á ríkisrættarligu viðurskiftunum – ta loysnina, sum javnaðarflokkurin situr við.

Farið tí mannsterk á val og seti ein sterkan javnaðarflokk inn á løgting. X við lista C ella eitt av valevnum javnaðarfloksins. Tað er eitt gott val fyri Føroyar og føroyingar.

# Koppsett ímóti fornuft?

**Sonni Jacobsen,**
*valevnið Miðflokksins í Vágum*



Sambært veljarakanningini seinast, so er tætt við annað hvørt vágafólk sambandsfólk. Nú ferð ein at ivast í, um tann góði læknin, ið er, hevur givið rættan heilivág? Ella hevur hann, sum Kári P. so skemtiliga kvæð á sinni, koppsett vágafólk ímóti fornuft?

Nú er tað keðiliga í Vágum og ikki minst í Sørvági, at eldra ættaliðið neyvan hevur lært Føroya søgu serliga væl í skúlanum, um í heila tikið. Nú skal ein ikki tala illa um tey farnu, men sannleikin er jú tann, at lærarin (DD) hjá teim eldru, og tað er alment kent, var so fanatiskur sambandsmaður, at tey bara lærdu um donsku kongarnar og um søgu Danmarkar.

Tey flestu av teimum eldru vita tí helst ikki, ella vilja tey ikki vita tað, at sambandið altíð hevur verið ímóti øllum framburði á Føroya landi í heila tikið. Flokksins avgjørda andstøða til føroyskt mál í kirkju, í skúla og á tingi og mótstøðan móti føroyskum flaggi eru bert nøkur smá dømi.

Í dag síggja vit hetta sinnalagið aftur í, at Sambandsflokkurin vil tvíhalda um sambandið við Danmark fyri ein og hvønn prís. Um tað so er til gagns fyri okkum ella ei er ikki høvuðsspurningurin. Tað er gamli konservativi illviljin ímóti øllum framburi.

Helt bara at eg skuldi nevna hetta, um tað var onkur, sum av vankunnu valdið júst umrødda flokk. Gongur ein hinvegin inn fyri øllum hesum, sum nevnt er, og kanska er stoltur av fortíð flokksins, ja, so er bara ein listi at seta krossin við. Men so vil eg eisini mæla til, at tú hereftir skrivar á donskum og flaggar við Danebrog. So ærligur var DD hóast alt.

Miðflokkurin hevur í sínum valuppleggi, at vit vilja ikki loysa fyri ein og hvønn prís, heldur ikki vilja vit samband fyri ein og hvønn prís. Vit kunnu væl liva við einum samstarvi við Danmark á jøvnum fóti, sum fleiri flokkar hava lagt upp til, og vit kunnu eisini liva uttan samstarv við Danmark. Annars er okkara støða til spurningin, at tað er fólksins avgerð og bert fólksins avgerð, ikki avgerðin hjá varaløgmanni ella løgmanni ella teirra flokkum einsamallum, um vit loysa ella ikki. Hetta er eingin kardinalspurningur hjá okkum. Tekur fólkið eina avgerð so ella so, eru vit teir fyrstu at góðtaka avgerðina hjá fólkinum.

Persónliga haldi eg, at vit eiga at bíða við so stórari avgerð til vit eru fíggjarliga óheft av dønum. Latið okkum veruliga stremba ímóti hesum máli, og so leggja framtíðarstøðu Føroya fyri fólkið at taka avgerð um, tá vænti eg at vit fáa stóran meiriluta fyri einum fríum Føroyum. Og stórur meiriluti í so stórum máli er at fyritrekkja. At skerja blokkin, meðan vit framvegis hava eina uttanlandaskuld upp ímóti 4 milliardum er ikki klókt, men gjørt er gjørt. Klókari hevði verið at goldið 360 mill. av uttanlandaskuldini. Vit eiga ikki at skerja blokkin meira fyrr enn uttanlandaskuldin er fingin av vegnum. Frí av skuld og uttan blokk standa vit frí og óheft og kunnu taka eina virðiliga avgerð uttan tvang og ræðumyndir, so at enntá teir djarvastu sambandsmenninir kanska fara at tora at ráða í egnum húsi. Ja, hvør veit? Men sum sagt, latið okkum gera okkum fíggjarliga óheft fyrst.



# Samgongan skert játtanina til Almanna-, Heilsu- og Mentannarøkið

**Eyðólv Dimon**
*Valevnið Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



Javnaðarflokkurin hevur í síni valskrá 2 mál, sum vera eitt krav til komandi samstarvsflokkar. Hesi eru
* at í minsta lagi 160 ellis- og røktarheimspláss verða útvegað komandi fýra árini og
* at pensjónirnar skulu hækkast til 10.000 kr. til støk og 16.000 kr. til hjún.

At samgonguflokkarnir, nú tað nærkast løgtingsvalið, tosa um, hvussu teir vilja bøta eldraøkið, er ein grov andsøgn til førda politikkin hesi seinastu 4 árini. Ferð eftir ferð júka umboð Tjóðveldisfloksins, at tað ongantíð áður hava verið játtaðir so nógvir pengar sum nú til almanna øki. Hetta skal lýsa, at samgongan raðfestir almannaøki frammaliga.

### Minnir ikki sørt um Goebbels

Men hetta er ein grov manipulatión, sum Goebbels neyvan hevði klárað at gjørt betri, tí sannleikin er júst hin øvugti. At krónutalið er hægri, merkir ikki altíð at umstøðurnar eru betraðar, tí tá ein tosar um vøkstur, so skal t.d. inflatión, lønarhækkingar o.a. roknast frá. Fyri at geva eina rætta mynd av politikkinum hesi fýra árini, so má játtanin setast í mun til t.d. Bruttotjóðarúrtøkuna (BTÚ), og nú gerst myndin ein heilt onnur.

### 27% av BTÚ í 1990

Í 1990 var kreppan farin at gera um seg í Føroyum. Fiskiskapurin á Føroya leiðini minkaði hetta árið við heili 30 % og fiskaprísirnir fóru sama veg. Arbeiðsloysistølini settu met hetta árið, og inntøkur landskassans gingu eisini skeiva vegin. Samgongan sum tá sat, við Jóannes Eidesgaard sum sosialmálaráðharra, raðfesti almanna-, heilsu- og mentannarøki frammaliga, og játtanin til hesi øki var 27% av bruttotjóðarúrtøkuni hetta árið.

### 24%av BTÚ í 2001

Til samanberingar kunnu vit hyggja at játtanini í fjør, tá rokfiskiskapur var, fiskaprísirnir vóru í hæddini, og landskassin hevði mio. í yvirskoti. Hetta árið var játtanin til almanna-, heilsu- og mentannarøki 3% lægri, ella 24% av bruttotjóðarúrtøkuni. Soleiðis raðfestir sitandi samgonga almanna-, heilsu- og mentannarøkið.

Nú haldi eg, tíðina vera komna har onnur, sum seta gerandisdagin hjá fólkinum ovast á breddan, sleppa at royna seg. Tú kann vera við til at fremja hesa broyting. Tak okkum uppá orðið og set tín kross fyri Javnaðarflokkin týsdagin hin 30. apríl.

# Nei til ognarskatt!!!

**Malan Helgadóttir**
*Valevni Javnaðarfloksins*



Stóð tað upp til Tjóðveldisflokkin, so var loysingin longu framd í komandi valskeiði. Treyt teirra fyri at verða við í eini samgongu eftir valið er, at hildið verður fast við løgtingssamtyktina um framtíðarstøðu Føroya. Løgtingssamtyktina, sum leggur upp til, at alt samarbeiði ímillum Føroyar og Danmark verður avviklað tey næstu 10 árini.

Hesum boðaði formaður Tjóðveldisfloksins frá á tíðindafundi nú um dagarnar. Sostatt er greitt, at Tjóðveldið vil avgreiða blokkin tey næstu fáu árini.

Eisini boðaði Høgni Hoydal á sama fundi frá, at Tjóðveldið vil lækka skattin hjá lág -og miðal inntøkum eftir valið.

Hesar 800 milliónirnar, sum koma at mangla í, skulu fíggjast við einum breiðkaðum skattagrundarlagi; men hvussu hetta skal fremjast í veruleikanum, kom tó ikki fram.

Men meðan vit bíða eftir svarinum frá Tjóðveldisflokkinum, skal tað sláast fast, at Javnaðarflokkurin ikki gongur inn fyri ognarskatti. Ognarskattur vil serliga raka sethúsaeigaran, og harvið vanliga føroyingin. Henda sama føroyingin, sum Javnaðarflokkurin vil lætta skattatrýstið hjá eftir valið 30. apríl. Fortreytin fyri okkara lyfti um skattalætta er sjálvandi, at blokkstuðulin verður varðveittur.

Ein sterkur Javnaðarflokkur eftir valið 30. apríl er tí tín trygd fyri, at ongin ognarskattur kemur.

# Tað er í ordan at vilja loysing, men vælsignaðir leggið formalistiskt fjas á hyllina

**Thomas Arabo**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymi*



At føroyingar, við at velja nakra aðra loysn enn fullveldi, lima seg inn í danska ríkið í allar ævir, er formalistiskt fjas. Undirbrotligheitin kemur týðiliga til sjóndar í hesum sjálvavmarkandi úttalilsum og er einki at byggja hetta uppá.

Tey, sum sverma fyri slíkum tankum, eru somu elementini, ið ganga runt og rópa upp um, at Heimastýrilógin er ólóglig, og at føroyingar móti sínum vilja hava verið hildnir í Heimastýrislógini. Vit hava havt Heimastýrislógina í meira enn 50 ár, og hevur Løgtingið ongantíð viljað uppsagt hana. Um tað ikki er at góðkenna hana, so veit eg ikki hvat er. At hon nú er ótíðarhóskandi, er so nakað annað.

### Send eitt fax til Anders Fogh og eitt pent bræv til Margrethu

Danir loyva okkum at loysa, tá vit vilja. Føroyingar sjálvir vita, at avgerðin liggur eina og aleina í Føroyum. Hvat er problemið? Problemið er, at føroyingar vilja ikki loysa í dag. Rættin at loysa hava vit til eina og hvørja tíð. Tað er bara at senda eitt fax til Anders Fogh og eitt bræv til Margrethu, har vit takka fyri tíðina, og so er loyst – hvør skal steðga okkum? Tað er bert tann detaljan, at føroyska fólkið vil ikki loysa, og tí má Tjóðveldisflokkurin innsíggja, at teir mugu slaka í fullveldismálinum og noyðast við minni enn loysing tey fyrstu nógvu árini.

### Eingin samgonga ber til uttan Javnaðarflokkin

Man má ikki gloyma, at um seinastu tvær veljarakanningarnar eru eftirfarandi, so ber eingin samgonga til uttanum Javnaðarflokkin, um vit ganga útfrá, at Sambandið og Tjóðveldið ikki kunna fara saman.

### Ikki diktera fyri eftirkomarnum, hvat teir skulu gera

Um loysingin skal koma um 12 ár ella 20 ár, so er tað veljarin til ta tíð, sum skal taka støðu til tað. Míni abbabørn hava valrætt til ta tíð, og sjálvsagt skulu tey kunna gera sína hugsan galdandi. Ert tú fyri at Løgtingið skal hava evsta vald í síni samtíð, so vel Javnaðarflokkin – fyri sjálvstýri í ríkisfelagsskapinum, men ímóti ES limaskapi.

# Gott samstarv – lyklaorðið í altjóða politikki

**Sune Jacobsen,**
*Valevni fyri Sambandsflokkin í Vágum*



Hvørt húski í landinum hevur fingið sendandi stevnuskránna hjá Sambandsflokkinum, har yvirskriftin er: „Gott samstarv“.

### Anders Fogh

Tað er einki nýtt í tí, at Sambandsflokkurin hevur samstarvað við danska Vinstraflokkin. Tað hevur verið gjørt, tí í einum felagsskapi er tað alneyðugt at kenna sjónarmiðini hjá hvørjum øðrum.

Vit hava ongantíð sum flokkur brúkt tað politiskt, at vinarlagið flokkanna millum vildi verið ein fyrimunur fyri Føroyar. Men her gongur sjón fyri søgn. Eftir vitjanina hjá Anders Fogh í Føroyum kapprunnu løgmaður og landsstýrismenn í fjølmiðlarnar at siga okkum, at nú vóru aðrir bollar komnir í súpanina í samskiftinum millum ríkispartarnar. Hetta vistu vit áðrenn.

### Sjókortið hjá Sambandsflokkinum

Á baksíðuni á stevnuskránni stendur Nýskipanaruppskotið hjá Sambandsflokkinum. Hetta uppskot er væl og virðiliga viðgjørt av sambandsfólki kring landið, og tá uppskotið endaliga varð samtykt á landsfundinum, varð Vinstriflokkurin kunnaður um nýggja sjókortið hjá Sambandsflokkinum. Soleiðis skulu viðurskiftini vera millum partar, ið samstarva.

### Sjókortið hjá Fullveldinum

Sitandi samgonga setti eisini út í kortið fullveldiskósina, sum hvørki tók hædd fyri boðum, enn minni skerum. Tí endaðu teir hvørja ferð uppi á turrum. Teir skilja ikki enn hví. Og eftir fýra ára fullveldisreyp, leggur fullveldisskútan at landi við gomlu Heimastýrislógini í lastini, og hon skal vera sjókortið í øllum førum fram til2012.

Nei- sigur Sambandsflokkurin. Vit skulu hava broytingar í viðurskiftunum millum ríkispartarnar, har floksins upplegg er Nýskipanaruppskotið. Vit vita, at flokkurin fær ikki meiriluta einsamallur, og tí verður neyðugt at samansjóða sjónarmiðini hjá møguligum samstarvspartnarum, um tað eydnast flokkinum at koma í samgongu.

### Konfrontatión burtur

Vit mugu gera okkum greitt, at konfrontatiónspolitikkur er ikki loysnin í dag. Øll eygu eru í hesum døgum vend móti Ísrael, har leiðararnir í stríðandi pørtunum báðum, Sharon og Arafat, liva av konfrontatiónspolitikkinum Teir eru politiskt steindeyðir báðir tveir, um friður fæst í lag.

Men hóast hetta, so vita vit øll innast inni, at einast gongda leið er at seta seg niður og tosa í sátt og semju.

Tí sigur flokkur okkara. Nú er nokk við konfrontatiónspolitikkinumvit seta samstarvið í hásætið.

Gott samstarv
Gott val øll somul.